## Kunning um einskiljingina

Nú Atlantic Airways skal einskiljast – fyrsti triðingurin verður boðin út í komandi viku – eru ivaleyst fleiri, sum hava spurningar av ymsum slag, áðrenn peningur verður settur í partabrævið.Kunnandi fundur um hetta verður í Norðurlandahúsinum klokkan 17 í dag, og er tiltakið opið fyri øllum áhugaðum.



## Byggja raðhús á Toftum

Nú verður farið undir at byggja raðhús á Toftum. Talan er um eina verkætlan við fimm raðhúsum á Kvíggjarheyggi á Toftum. Farið verður undir byggingina síðst í ár og eftir ætlan verða húsini liðug tíðliga í 2008. Hvørt hús kostar slaka 1,5 millión og tey verða innrættað við gongd, vesi, baðirúmi, køki og stovu í einum eini stórari stovu, fýra kømurum, kjallara og fýrrúmi, sigur Nes Kommuna á síni heimasíðu

# Mugu fyrireika okkum




*- Vit mugu hava neyvar reglur fyri frítíðarfisking, sum tryggja bæði náttúruna og vinnuna, ið skal liva av at veita frítíðarfisking til ferðafólk. Vit mugu gera, hvat vit kunnu fyri at byggja upp einari burðardyggari ferðavinnu sum heild – eini vinnu, sum er við til at varðveita tey ómetaligu virði, ið kunnu "selja" Føroyar úti í heimi, soleiðis at vit eisini í framtíðini kunnu liva av hesum virðum í ferðavinnuni, sigur Elin Heinesen, stjóri í SamVit*

**Magni Blástein, sum veitir havfiskingartænastur til ferðafólk, segði í síni framløgu á vistferðaráðstevnuni, at ein bátur, sum fiskar og selur fiskin fyri 600.000 krónur, kann tjena upp til heilar 3,6 miljónir krónur fyri júst somu søgd av fiski. Hetta letur seg gera, um fiskurin verður veiddur saman við ferðafólki og sleptur út aftur. Tá svimur fiskurin enn í havinum og kann fiskast umaftur og umaftur, umframt at fiskastovnarnir tá ikki verða ovfiskaðir**

VISTFERÐA-RÁÐSTEVNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinasta leygardag var ráðstevna í Norðurlandahúsinum um vistferðavinnu, har altjóða serfrøðingar á økinum luttóku við áhugaverdum fyrilestrum.

Ráðstevnan vísti eitt nú, hvussu góðar møguleikar, vit hava í Føroyum fyri eini burðardyggari vistferðavinnu - um vit bera okkum rætt at.

### Vinnan misskilti

Elin Heinesen, stjóri í SamVit, heldur, at fokus eigur at verða sett á tað, sum var ein av týdningarmestu niðurstøðunum á hesi sera væleydnaðu ráðstevnu.

- Eg haldi, at vit eiga at seta fokus á, hvussu týdningarmikið tað er, at øll - bæði í vinnuni og í tí almenna - nú samstarva um at fyrireika Føroyar til eitt vaksandi tal av (vist)ferðafólki, sum fara at koma henda vegin.

Leygardagin, sum ráðstevnan varð hildin í Norðurlandahúsinum, hevði útvarpið samrøðu við Elin um ráðstevnuna. Samrøðan varð send í tíðindunum klokkan 18, og brot vórðu send aftur sunnudagin eftir.

Í práti um niðurstøðurnar segði Elin Heinesen, at National Geographic kanningin er eitt "wake up call". Hon segði eisini, at vit í Føroyum á nøkrum økjum ikki kunnu liva upp til tey krøv, ið verða sett til okkara.

- Vit eru ikki nóg væl fyrireikað til at taka ímóti tí hópi av ferðafólki, sum kanska fer at koma henda vegin, nú vit hava fingið so gott skoðsmál í National Geographic Traveller.

Stjórin í SamVit vísti á, at vandi kann vera fyri, at vitjandi tí kunnu gerast vónbrotin, tá tey koma henda vegin.

- Eg standi við hesa viðmerking, men sæð í øðrum høpi, enn onkur hevur skilt hetta. Tað, eg hugsaði um, er føroyska náttúran, ið eg haldi, at vit ikki verja nóg væl sum er. Eg skilji, at onkur hevur misskilt og heldur, at eg fanst at tænastustøðinum í ferðavinnuni sum heild, men eg tosaði í hesum førinum als ikki um tænastustøðið, sigur Elin.

Í Dimmalætting hava úttalilsini hjá stjóranum í SamVit verið løgd fram, sum um hon serliga fanst at tænastustøðinum á gistingarhúsunum og matstovunum.

- Nei, tað var ikki hetta virksemi, eg hugsaði um og sipaði til, leggur Elin Heinesen dent á.

Hon vónar tískil ikki, at góða samstarvið millum gistingarhús, matstovur og SamVit verður skatt av hesi misskiljing.

- Eg havi sjálvsagt ongan áhuga í at leggja sjógv ímillum okkum og tey, sum vit skulu tæna, sigur hon og